# H71

adidas

HØLLIN Á HÁLSI

# CHALLENGE CUP



**FALDARI 1** FRÍGGJADAGIN **11. OKTOBER 2019**
SUNNUDAGIN **13. OKTOBER 2019**

EHF CHALLENGE CUP

## H71 - RK MARIBOR BRANIK KL. 19.00
## RK MARIBOR BRANIK - H71 KL. 19.00


Auto Service
BÓNUS ...er biligari!
J&K
INTERSPORT Thomas Dam ítróttur
ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4
LAIDERZ
SUÐUROYAR SPARIKASSI

# GÓÐA EYDNU, H71!

Tað er ikki hissini stig, hondbóltsfelagið í Hoyvík tekur, nú H71 hevur gjørt av at royna seg í europeisku kappingunum fyri lið. Tí er høllin á Hálsi um vikuskiftið karmur um tveir dystir í Challenge Cup-kappingini ímóti slovenska felagnum, RK Maribor Branik.

At føroysku liðini í europeisku kappingunum sleppa at spæla ímóti munandi harðari mótstøðu, enn tey eru von at møta í føroysku kappingini, ger hesar dystir serliga áhugaverdar. Bæði tekniskt, taktiskt og kropsligt er talan um stórar avbjóðingar, men í øllum hesum er góður lærdómur at fáa hjá ungu hoyvíkingunum, ið hava framtíðina fyri sær.

Í Tórshavnar kommunu kunnu vit fegnast um, at vit í bestu mansdeildini hava fýra feløg umboðað, tí har spæla bæði H71 í Hoyvík, Neistin og Kyndil í Havn, og KÍF í Kollafirði, umframt at fimta felagið, ÍA, er við at taka seg væl fram á Argjum. Við øðrum orðum grør um gangandi fót.

Serliga hesi seinnu árini hevur H71 veruliga gjørt ein vørr, so felagið er vaksið nógv, samstundis sum tað er eydnast at menna hondbóltin frá teimum yngstu til tey elstu. Bæði á gentu- og dreingjasíðuni ger H71 eitt miðvíst og serstakliga væl skipa barna- og ungdómsarbeiði, ið leggur lunnar undir eina gylta hondbóltsframtíð næstu mongu árini.



Mansliðið hevur vunnið føroyameistaraheitið síðstu trý árini, og síðani 2009 er tað blivið til fýra meistaraheiti tilsamans, umframt at H71 hevur vunnið steypakappingina tríggjar ferðir. Sostatt eru hoyvíkingar væl dubbaðir til stóru europeisku avbjóðingarnar um vikuskiftið.

Tórshavnar kommuna fegnast um møguleikan at vera við á síðulinjuni, og tað er bæði við gleði og stoltleika, at vit leggja bestu karmar til, sum vit her á landi hava til slíkar dystir. Lítið man vera at ivast í, at H71 fer at gera sítt besta, og vil eg tí fegin ynskja hoyvíkingum allarbestu eydnu!

**Annika Olsen**
borgarstjóri

**Hondbóltsfelagið H71**, Hoyvíkshøllin, Postsmoga 1067, FO-188 Hoyvík, www.h71.fo

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 541 705

**Ábyrgd av faldara:** Erland Jensen
**Snið, umbróting og prent:** Føroyaprent

BANK**NORDIK**

# Lær við Vitusi og Bubu

**banknordik.fo/vitus**



# H71 NÝGGJAR AVBJÓÐINGAR

Nú H71 skjótt verður hálva øld, halda nevnd, leikarar, venjarar og viðhaldsfólk, at tíðin er komin til nýggjar og størri avbjóðingar, enn vit annars eru von við. Tí gleða vit okkum til at bjóða hoyvíkingum og føroyingum til dyst, har vit skulu møta sterka slovenska liðnum, RK Maribor Branik.

H71 hevur við miðvísari venjing fyrireikað seg til hesa uppgávuna, og nógv fólk og fyritøkur hava gjørt tað møguligt hjá okkum at spæla tveir altjóða dystir í høllini á Hálsi. Vit í H71 takka fyri allan stuðul og alla hjálp, tí uttan fíggjarligan stuðul var hetta sera trupult og uttan stóru hjálpina sum sjálvboðin, ólønt fólk í og kring H71 hava lagt í hetta tiltak, var tað ómøguligt.

Skal hondbólturin mennast, mugu vit áhaldandi seta okkum nýggj mál. Okkara landslið hava fingið góð úrslit seinnu árini og vit í H71 hava eisini fingið avbjóðingar og góð úrslit í ungdóms- og barnadeildunum, tá ið vit hava verið við í kappingum uttanlands.

Tíðin er nú komin til at síggja, hvat okkara fremsta manslið, sum hevur vunnið føroyameistaraheitið trý ár á rað, megnar ímóti sterkari liðum og harðari mótstøðu, enn vit finna her heima. Bert við at royna okkum ímóti betri liðum, mennast vit og gerast meira áhaldandi í okkara venjing, og tí hevur H71 valt at tikið av europeisku avbjóðingini í Challenge Cup-kappingini.



Tórshavnar kommuna og hallarumsitingin hevur verið ein góður viðleikari, so alt er klárt, og vóna vit at síggja nógv fólk til dystirnar báðar. Slíkir dystir eru sum landsdystir at rokna, so vónandi síggja vit eisini fleiri, ið ikki vanliga eru H71-viðhaldsfólk. Tey kunnu í øllum førum síggja fram til, at onkur gevur H71 ein skarpan gang.

**Anna Dam**
forkvinna í H71

NORÐOYA SPARIKASSI

# Skalt tú keypa hús ella íbúð?

Tosa við okkum um fígging




ns.fo

*Norðoya Sparikassi Hoyvíksvegur 67 FO-100 Tórshavn Tel. 47 5000 Fax 47 6015 ns@ns.fo*



www.torshavn.fo
Skapandi, mennandi, kveikjandi
TÓRSHAVNAR
KOMMUNA



Tað besta omaná
Forkela familjuna. Royn okkara
leskiliga vaniljukrem.
VANILJU
KREM
Nýggj vøra!

REYNI SERVICE P/F

Umhvørvisviðurkent
ISO 14001 virki

Tórshavn: Vegurin Langi 41, Hoyvík, Tel 35 30 40
Klaksvík: Klingrugarður 3, Tel 47 30 40

Pf. Jógvan Weihe

P/F Jógvan Weihe | Tel: 35 38 97 | Fax: 35 38 98
www.weihe.fo | weihe@weihe.fo

# EGINSTUÐLAR HJÁ

TATANKA

LAIDERZ

SALMON PROTEINS

LBF

SMJ | RÁÐGEVANDI VERKFRØÐINGAR

PRISMA

AUTO TAXI

bilrokt.fo

# H71 TAKKAR

# H71 KVINNUM

SMYRIL LINE

EXPLORING OF THE NORTH ATLANTIC

TUR.FO

magn

VØRUHÚSIÐ

Januar

LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

FAROE SHIP

ADVOKATSKRIVSTOVAN

ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4

# FYRI STUÐULIN




javni

Hoydalsvegur 40/Loftið
FO-100 Tórshavn
Tel +298 20 80 90
javni@javni.fo
www.javni.fo

Kaj Andreasen & Co
Handilin við tí fjølbroytta úrvalinum
www.andreasen.fo

# »GOTT ER AT HAVA GÓÐAN Í RÁÐUM«



## ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4

YVIRI VIÐ STROND 4 · TEL 203040 · FAX 203041 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
LAWFIRM@LAWFIRM.FO
WWW.LAWFIRM.FO

JÓGVAN PÁLL LASSEN · PETUR EVEN DJURHUUS
JÓGVAN E. ELLEFSEN · ANNA DAM · INGI HØJGAARD
GUNN ELLEFSEN · JULIANNA KLETT

# VOLVO XC40



*Bilurin á myndini verður vístur við eyka útgerð







PRÍSUR ÚR

**398.000,-**

+ LEVERINGSKOSTNAÐ

## LEITAR TÚ EFTIR DREYMABILINUM?

Hevur tú altíð droymt um ein bil, sum ikki er ov stórur, men alíkavæl rúmar nógv og har snið, tøkni, hentleikar og trygd ganga upp í eina hægri eind? – Ja, so er hetta dreymabilurin. Ger dreymin til veruleika! Kom og royn hann hjá P/F Wenzel, Volvo umboð í Føroyum.

Akranesgøta 5 · Tórshavn · tel. 35 45 00

VOLVO

WENZEL.FO




Thomas Dam Intersport
Bøgøta 1, Klaksvík
455320

Thomas Dam Intersport
Jónas Broncksgøta 21, Tórshavn
355300

Thomas Dam Intersport
Glyvravegur 38, Glyvrar
447399




**Niels Finsensgøta 5, 100, Tórshavn, 355310**
**@theathletesfoottorshavn**

# Eitt sindur um mótstøðuna

Fyrstu ferð síðani 2011 skal eitt føroyskt lið aftur royna seg í europeiskum hondbólti, tí í ár hevur H71 valt at tikið av møguleikanum at spæla europeiskan hondbólt. Seinast, eitt føroyskt lið var úti í Europa, var tað Neistin, sum spældi seg víðari til annað umfar í EHF Cup-kappingini.

Europeiskur liðhondbóltur er býttur sundur í trý stig. Á hægsta stigi eru tað tey bestu feløgini, sum kappast í meistarakappingini EHF Champions League. Á næsthægsta stigi kemur EHF Cup-kappingin, og á triðja og lægsta stigi kemur so "okkara kapping", Challenge Cup-kappingin.

Tann 16. juli gjørdist greitt, at H71 skuldi spæla ímóti slovenska felagnum, RK Maribor Branik. Felagið var í fjórðingsfinaluni í EHF Cup-kappingini kappingarárið 2012/13, og í skrivandi stund liggur Branik eftir tríggjar dystir á sjeyndaplássi í slovensku kappingini. Í fjør endaði liðið sum nummar fýra í landskappingini og var árið fyri á sjeyndaplássi.

## Slovenskur hondbóltur

Í slovensku landskappingini er tað serliga eitt lið, sum ár eftir ár skarar framúr. Tað er RK Celje, ið javnan er við í Champions League í hondbólti. Felagið vann Champions League kappingarárið 2003/04, og hevur vunnið slovensku landskappingina ikki færri enn 22 ferðir.

Í landsliðshøpi eru vit eisini von at síggja Slovenia. Í 2017 vunnu slovenar triðjapláss í HM-endaspælinum í Fraklandi, og í 2004 spældu teir seg á heimavølli í HM-finaluna.

Hóast svingandi úrslit seinnu árini, er eingin ivi um, at slovenskur hondbóltur enn er væl framman fyri føroyskan hondbólt. Á EHF-styrkilistanum yvir tær ymsu europeisku deildirnar, liggur slovenska deildin á tíggjundaplássi, meðan føroyska deildin ikki so frægt sum er styrkismett. Tó hava Føroyar, saman við tíggju øðrum londum, fýra Challenge Cup-pláss at býta ímillum sín.

## Leikarar í stórfeløgum

Um vit hyggja at fyrrverandi leikarum hjá RK Maribor Branik, stinga fleiri stór hondbóltsnøvn seg upp. Eitt nú høgri vongur í Telekom Vezprem, Dragan Gajic, eins og spælskiparin hjá THW Kiel, Miha Zarabec, sum spældi tvey ár í slovenska felagnum í 2012 til 14, áðrenn hann leitaði sær víðari til Celje, og síðani til Kiel í 2017.

Ein av sterku strikuleikarunum á slovenska landsliðnum hevur eisini spælt í Maribor. Talan er um Igor Zabic, sum í dag spælir við Wisla Plock. Montenegrinski málverjin, Mile Mijuskovic, sum var við, tá ið føroyska landsliðið spældi javnleik ímóti Montenegro, hevur eisini spælt fyri slovenska felagið.

Renato Vugrinec og Luka Zvizej, sum hava spælt ávikavist 187 og 217 landsdystir fyri Slovenia, eru eisini millum mongu kendu leikararnar, ið hava spælt við RK Maribor Branik.

## Sibila aftur venjari

Sum nevnt, er RK Maribor Branik á sjeyndaplássi í landskappingini í Slovenia. Toppskjútti á liðnum er 24 ára gamli Filip Jerenec, og hevur 190 sentimetra høgi vinstri bakkurin higartil skotið 13 mál í trimum dystum.

Liðið er annars samansett av leikarum úr fýra ymsum londum. Teir flestu leikararnir eru úr Slovenia, men harumframt eru fýra kroatar, ein esti og ein ungari. Venjarin eitur Marko Sibila, sum fyri aðru ferð er venjari hjá Maribor. Hann fekk sekkin

***Framhald á síðu 16***

FOKUS 18:29

Lætt og stuttligt



## Ger tínar dreymar til veruleika
- sama um tú vilt fara undir útbúgving, ert sjómaður ella vilt spara saman til eini hús.

Fokus pakkin hevur alt tað tú hevur tørv á – NemKontu, FokusLán, FokusKreditt, Gjaldskort, Netbanka og FramtíðarKontu. Sum Fokus kundi fært tú ókeypis tænastur, lagaliga fígging og góða rentu.

**Gjaldskort** **Netbanki** **Fígging** **FramtíðarKonta**

Vitja okkum í Vági og Havn.

**ss.fo**

SUÐUROYAR SPARIKASSI

ANNIJANNI

í oktober 2014, eftir teir vórðu varpaðir úr EHF Cup-kappingini av svenska IFK Kristianstad.

Sibila hevði fingið góð úrslit við liðnum árini frammanundan, og í heimligu kappingini endaði Maribor nummar trý, umframt at spæla seg í fjórðingsfinaluna í EHF Cup-kappingini í 2012/13.

Síðan gjørdist hann í 2015 venjari hjá kappingarneytanum, Gorenje Valenje, men eitt lítið ár seinni var hann aftur arbeiðsleysur, tá ið hann bleiv loystur úr sáttmálanum eitt ár fyri ásetta tíð. Nú er Sibila so aftur í Maribor. Spurningurin er so, um hansara royndir í europeiskum hondbólti fara at hjálpa Maribor í dystunum ímóti H71.

## Føroya-ferð er lønin

Ikki er lætt at finna upplýsingar um slovenskan hondbólt á netinum, tí slovenska málið er ikki lætt, og lítið og eink finst á enskum. Heldur ikki verða teldupostar til felagið og umsitingina svaraðir.

Tó er eydnast okkum at finna eina grein frá felagnum, har tað stendur, at leikararnir gleða seg til at vitja Føroyar. At felagið valdi at koma til Føroya at spæla báðar dystirnar, var fyri at løna leikarum sínum. Lagt verður tó afturat, at nú báðir dystirnir eru á útivølli, er talan um eina trupla uppgávu.

"Mótstøðuliðið er eitt ókent lið, og tí krevur tað gjølla fyrireiking og analysu," sigur RK Manibor Branik á heimasíðu síni, har lítið tó er at ivast í, at felagið ætlar sær víðari til annað umfar í Challenge Cup-kappinigni.

Felagið hevur nógvar royndir í europeiskum hondbólti, og tí hómast eisini ein ávís svongd eftir at gera ein vørr í kappingini: "Vit lata einki til tilvild. Vit fara til Føroyar við einum máli, sum er at spæla okkum víðari til annað umfar," sigur liðformaðurin og høgri vongurin, Tadej Sok.




*Vinstri bakkurin hjá RK Maribor Branik, 24 ára gamli Filip Jerenec, er toppskjútti hjá felagnum í heimligu kappingini júst nú, so hann er avgjørt ein av teimum, H71 skal ansa væl eftir. (Mynd: Anamarija Valentina Dajnko)*

## Fyrrverandi leikarar í RK Maribor Branik

**Dragan Gajic** (høgri vongur), Vezprem í Ungarn

**Miha Zarabec** (spælskipari), THW Kiel í Týsklandi

**Igor Zabic** (strika), Wisla Plock í Polandi

**Mile Mijuskovic** (málverji), Benidorm í Spania

**Renato Vugrenic,** fyrrverandi landsliðsleikari fyri Slovenia, 187 dystir og 616 mál

**Luka Zvizej,** fyrrverandi landsliðsleikari fyri Slovenia, 217 dystir og 702 mál

# Frítíðin byrjar umborð

Lætt og ómakaleyst ber til at koyra bæði Danmark, Ísland og alt Evropa upp og niður, júst tá passar tær. Við egnum bili er alt nógv lættari. Pakka viðførið í bilin, koyr umborð og njót ferðina.

Tá tú ferðast við Norrönu, kanst tú byrja at halda frí, leingi áðrenn tú kemur fram til títt frítíðarstað ella summarhús. Umborð á Norrönu kanst tú halda frí, so tað stendur eftirí.

Les meira á **www.smyrilline.fo**, skriva til **booking@smyrilline.fo** ella ring **345900**







LM ELECTRIC - 100 TÓRSHAVN - HOYVÍKSVEGUR 53
TEL 35 12 20 - WWW.LM.FO - LM@LM.FO

Grannskoðan // Ráðgeving // Bókhald // Roknskapur

Skalt tú meta
um framtíðina
mást tú
kenna fortíðina

WWW.JANUAR.FO

Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

SENDISTOVAN

# 3 hálvleikur í Angus



**Bílegg borð á tel. 717777**

Vit svara millum kl. 11.00 og 22.00

## Vit stuðla kvinnuliðnum hjá H71



ANGUS STEAKHOUSE




Mynd: Gudmund Helmsdal

LAIDERZ
*Fokus på sportsfaciliteter*

# HOYVIKSVØLLURIN

Fyrsti FIFA QUALETY PRO
góðkendur vøllur í Føroyum.

**Graslíkisslag: JUTA MASTER 40/200 á EL25**



www.laiderz.dk







HJÁ **FRÓÐA**

SMYRILSVEGUR 10
TÓRSHAVN

# REINAR TENN BRENNA IKKI



## ÆTLAR TÚ AT STOYPA?

Tosa fyrst við okkum.

Framkomna, teldustýrda betong-blandiskipanin syrgir fyri, at tú kanst vera heilt vísur í, at tú fært betong av allarbestu góðsku bæði til nýtslu á landi og undir vatni
Blandi- og pumpubilar okkara bera so í bandi, at útkoyring og fylling í formar v.m. ikki er nakar trupulleiki - heldur ikki um tvørligt er at sleppa framat.

Vit koyra um alt landið og eru kappingarførir í prísi!



**J & K Betong**

á Hjalla | Postboks 3179 | FO-110 Tórshavn | tel 31 50 60 | fax 31 41 94 | e-mail: jkp@jkp.fo | www.jkp.fo
Blandimeistarin tel 58 50 25






## Visti tú at...

Vit ala á harðbalnum økjum fyri ikki at dálka umhvørvið.

Vit skapa og menna heimsins mest burðardyggu mannagongdir at ala laks.

HiddenFjord laksur svimur úr sjónum til góðskingarvirkið fyri ikki at gerast strongdur.



HiddenFjord laksur livir í einum av heimsins reinastu høvum við røttum sjóvarhita. Hetta er natúrliga umhvørvið hjá villa atlantiska laksinum.

Vit leggja stóran dent á at ala ein natúrligan laks uttan antibiotika og hormonir.

HiddenFjord laksur smakkar sera væl og er stak heilsugóður.

# Hoyvíkingar ganga undan

**– At H71 nú tekur stigið og fer út í Europa at royna seg, er ein skilagóð avgerð, tí nú hava hoyvíkingar í fleiri ár víst vegin, sigur Ingi Olsen, ið bæði sum spælari og venjari hevur roynt seg í europeiskum dystum fyri VÍF og Neistan**

Fáir føroyingar munnu hava so stórar altjóða royndir í hondbólti sum 50 ára gamli vestmenningurin, Ingi Olsen. Hann var 18 ára gamal, tá ið hann spældi sínar fyrstu europeisku dystir, ið samstundis vóru fyrstu dystirnir á besta mansliðnum hjá VÍF. Dystirnir ímóti týska Tusem Essen vóru báðir í Vestmanna.

– Hetta var fyrst í oktober mánaði í 1987, og har byrjaði mín hondbóltskarriera. Vit taptu annan dystin við 11 málum og hin við 12, men allíkavæl var hetta ein stór uppliving. Millum spælararnar hjá Tusem Essen var Alfreð Gíslason, sum helst er kendasti íslendski hondbóltsspælari yvirhøvur, sigur hann.

Tíggju ár seinni eydnaðist Inga og hinum vestmenningunum í tveimum dystum at spæla fult upp ímóti rumenska stórfelagnum, Dinamo Bucaresti – og enntá at vinna annan!

– Tað var valla nakar, ið hevði væntað, at VÍF skuldi hava nakran sum helst kjans, sigur spælandi venjarin um teir báðar dystirnar, har Dinamo Bucaresti vann tann fyrra 25-20, men í seinna dystinum fekk ein óvæntaðan ósigur, tí VÍF vann 17-16.

## H71 hevur víst vegin

– Okkara hugburður var, at vit fóru óimponeraðir inn til uppgávuna við eini góðari blanding av rutinu og ungum monnum. Tað sama síggja á liðnum hjá H71 í dag, so míni fyrstu ráð skulu vera, at hoyvíkingar fokusera upp á sítt egna og ikki hyggja ov nógv at mótstøðuni, tí tú kanst røkka úrslitum, um tú torir at trúgva á egnan mátt og egna megi, sigur Ingi Olsen.

– At H71 nú tekur stigið og fer út í Europa at royna seg, er ein skilagóð avgerð. Hoyvíkingar hava nú í fleiri ár víst vegin, so tí er hetta eitt púra natúrligt stig at taka afturat. H71 er eitt seriøst felag, og at besta mansliðið nú fer út at spæla í Challenge Cup-kappingini, er lønin fyri tað harða arbeiðið, ið liggur aftanfyri.

Ingi sigur, at tað krevur nógva orku at spæla í europeisku kappingunum fyri feløg, og tí hevur tað ofta víst seg at ganga út yvir avrikini í heimligu kappingini.

– Men íløgan í at spæla hesar dystir er tað verd. Og nú H71 hevur eitt so gott lið í ár, ivist eg í, um tað fer at henda. Tú skalt venja nógv, um tú skalt spæla slíkar dystir, men tað eru spælararnir jú vanir við, so




*Ingi Olsen hevur bæði sum spælari og spælandi venjari roynt seg í europeisku kappingunum við VÍF og Neistanum, men nú hevur hann tikið sær eitt sabbatsár. (Mynd: Álvur Haraldsen)*

hetta verður ikki tann stóra broytingin, heldur hann.

### Vísa seg fram

Ingi Olsen nevnir eisini, at nú so nógvir og evnaríkir spælarar eru á liðnum hjá H71, hava óivað fleiri lið eyguni við teimum – ikki minst eftir avrikið hjá U17-landsliðnum í Göteborg í summar. Hann heldur, at teir spælararnir, ið vístu seg fram har, saktans eisini kunnu koma at vísa seg enn meira fram nú.

– H71 hevur vunnið meistaraheitið trý ár á rað, men tað fyrsta árið vóru vit í VÍF væl við, og høvdu vit havt Áka Egilsnes á liðnum alt kappingarárið, kundi tað kanska verið farið okkara veg í staðin. Men samstundis sum eg kundi hugsað mær hann á liðnum tá, skilti eg eisini øgiliga væl, at hann vildi taka kjansin uttanlands, og tað var honum eisini væl unt, sigur Ingi.

– Eg vóni eisini, at nakrir av teimum bestu hjá H71 eisini fara at vísa vegin, tí tað er ein serligur møguleiki at spæla europeiskar dystir. Hoyvíkingar hava í denn grad verið undangongumenn, tá ið tað kemur til kropsliga venjing, so spennandi verður at síggja, hvat teir fáa tað til ímóti hesum slovenska liðnum.

Sjálvur hevur Ingi Olsen fyri fyrstu ferð síðani tíðliga í 90-unum fingið sær eitt sabbatsár, so tí er hann ikki dagligur venjari hjá nøkrum liði. Tó hevur hann ikki slept øllum, men er framvegis landsliðsvenjari hjá Grønlandi.

– Vit hava eina undankapping í juni, so eg royni at samla liðið í Grønlandi, tá ið tað ber til. Men grønlendska landskappingin man vera heimsins harðasta kapping, tí hon verður avgreidd eftir eini viku um mánaðarskiftið apríl/mai við dystum hvønn dag og onkuntíð tveimum dystum um dagin. Tað gevur eitt sindur serligar arbeiðstreytir, sigur føroyski landsliðsvenjarin hjá grønlendingum.


SKORA
VIÐ SISU
SISU
Föroya Bjór


FÖROYA BJÓR Í HOYVÍK
Karlamagnusarbreyt 17
OPIÐ
Hósdag kl. 13.00 - 18.00
Fríggjadag kl. 13.00 - 19.00
Leygardag kl. 13.00 - 16.00

# TÁ RÆTT SKAL VERA RÆTT



ADVOKATSKRIVSTOVAN

Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Helga á Borg, adv.

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN
TELEFON: (298) 35 33 35 · TELEFAX: (298) 35 33 36 · WWW.JURA.FO






**Active Info Display**
Tann analogi ferðmálarin er avoldaður. Við eykaútgerð kanst tú fáa skift tey siðbundnu rundu instrumentini út við einum talgildum skíggja í høgari upploysing. Nýskapandi instrumentbrettið gevur tær møguleikan at síggja nógv meira enn bara ferðina og brennievnisnýtsluna.

**Infotainment**
Uttan mun til um tú ynskir at ringja til onkran, meðan tú koyrir, at fáa upplýsingar um ferðsluna, at koma fram á mál við hjálp av navigatiónskipanini, ella bara ynskir at lurta eftir egnum tónleiki – tín Golf hevur eitt hav av møguleikum at bjóða tær við nútímans tøkni á ein lættan og greiðan hátt.

**Bilasolan.fo**

**Bilasølan**
**Vegurin langi, 359700**

# Bussar til øll endamál

Í Føroyum og uttanlands







Loysnir 214452

M B

MOURITSEN´S BUSSAR

Tel 32 21 21 · mb@mb.fo

#ALTBERTIL

# SKELTI OG BANNARAR Í ØLLUM STØDDUM

## HUGSA STÓRT HUGSA FØROYAPRENT

Á Føroyaprent hava vit ein framkomnan skeltiverkstað, har vit gera alt frá stórum skeltum við lýsandi stavum til smá navnaskelti – **ALT BER TIL!** **Bannarar til tiltøk fáast eisini hjá okkum.** Vit skera út á okkara nýggja skeriborði. Bilin prýða vit við foliu, um tú vilt síggjast. Ring, støkk inn á gólvið, fá eitt gott tilboð.

Tel. 314555 www.foroyaprent.fo

Føroyaprent



Gullpakkin við keypi av nýggjum bili

# Hesin er við í prísinum í trý ár..!

**Tá tú keypir nýggjan bil frá Auto Service, fylgir Gullpakkin við, sum ger at tú sleppur undan at hugsa um útreiðslur til viðlíkahald og eftirlit av bilinum næstu trý árini.**



*Heðin Weihe, verkstaðsleiðari*



Visti tú av, at tú eigur, sambært framleiðaranum av bilinum, í minsta lagi einaferð um árið til eftirlit við bilinum fyri at varveita garantiið ?

Somuleiðis mást tú skifta olju í mun til, hvussu nógv tú koyrir, perur fara, sprinklaraveska skal fyllast á so hvørt, og so alt annað, so sum bremsur, útstoyt og stoytdoyvarar kunnu fara.

Alt hetta kann gerast til heilt fitt av peningi. Men við Gullpakkanum, sum fylgir við, fært tú alt hetta fyri einki..! Ja, í veruleikanum fært tú ein mekanikara við eykalutum í 3 ár ella til tú hevur koyrt 90.000 km, við í prísinum, tá tú keypir nýggjan bil frá okkum.

Vælkomin til eitt gott bilakeyp.



**Í Gullpakkanum fært tú:**

- Eftirliti og viðlíkahald av bilinum og harafturat allar neyðugar umvælingar
- Arbeiðsløn, eykalutir sum t.d. perur, viskarabløð og neyðugar veskur og viðlíkahalds- og umvælingararbeiði.
- Tað vil siga: **Ongar viðlíkahalds-útreiðslur komandi trý árini!**

Sí treytir á www.autoservice.fo

**Auto Service**
www.autoservice.fo

Undir Krákugjógv 19 - Postboks 3168 - 100 Tórshavn - Tel 34 54 00 - as@autoserice.fo


SPEKT kann hjálpa tær við
Bókhaldinum
Roknskapinum
Lønarumsitingini
Sjálvuppgávuni
Kapitalvinnings-sjálvuppgávuni
Rentustuðlinum
Útlendskum skatti
Afturrindan av mvg
Eftirlønum
SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. ·Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn ·Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo
SPEKT
løggildir grannskoðarar

FAROE SHIP


Keyp vetrardekkini
hjá okkum.
Helst bestu prísir í landinum ...
WAAG
Tel. 613666
VREDESTEIN


Brekkutún 4 | 188 Hoyvík | Tel. +298 30 88 00 | torshavn@samskip.com | www.samskip.fo
TÍTT FLUTNINGSFELAG
samskip



# Út í Europa á fyrsta sinni

Fyri fyrstu ferð nakrantíð er fremsta manslið okkara við í europeisku kappingini fyri meistaralið, Challenge Cup. Eisini er hetta fyrstu ferð síðani 2011, at eitt føroyskt meistaralið er við í hesi kapping. Við hesum kann H71 nú stilla seg undir liðina á teimum fáa feløgum í Føroyum, sum hava verið við í europeisku hondbóltskappingunum fyri meistaralið, tí bara Kyndil, Neistin og VÍF hava roynt tað undan okkum.

H71 hevur annars haft ríkiligt av høvum til tess undanfarnu árini, men hevur altíð borið seg undan. Uppgávan hevur verið mett at verið ov møtimikil fyri felagið. Í summar fekk fremsta lið okkara íslendskan venjara, og ikki minst hansara ávirkan og "íslendski hugburður" munnnu hava viðvirkað jaliga til, at avgerð er tikin um at fara við. Kanska hetta ikki er eitt so øgiliga stórt fet fyri einstøku leikararnar á fremsta liði okkara, sum nú í fleiri ár í landsliðshøpi hava verið við í hópin av altjóða kappingum, men fyri felagið sjálvt er hetta avgjørt eitt risafet.

Tá soleiðis fyri fyrstu ferð verður leitað út um heimligu eingjargarðarnar í Hoyvík og litið íkring á veruliga altjóða hondbóltspallinum, so setur slíkt avgjørt nýggj og hørð krøv til karmar – bæði um felag og dystirnar, sum munandi arbeiði skal leggjast í at lúka. Gaman í, vit hava nú í fleiri ár luttikið í Partille-kappingum í Svøríki, men er hetta á øðrum stigi, so tað kann valla samanberast.

Í lutakastinum hevur H71 fingið RK Maribor Branik úr Slovenia sum mótstøðulið, og sum skilst er hetta sera hørð mótstøða. Tó er eydnast at samráða seg fram til, at báðir dystir verða leiktir í Føroyum. So hóast vit skulu út í Europa at leika, so verður tað – í øllum førum fyri fyrst – bara við dystum heima í Føroyum. So sigast kann, at vit stinga bara stórutá niður í altjóða hondbóltsdammin í fyrsta umfari.

Mótstøðan er óivað ivaleysa hørð og krevur hetta nógv av leikarum okkara, skulu vit gera okkum vón um at fáa eitt líkinda úrslit burturúr. Men samstundis skal eingin ivi vera um, at vit halda okkum hava ein so frægan hóp, at hann saktans kann bjóða av í altjóða høpi. Verða hetta tveir góðir dystardagar hjá okkum, skulu vit nokk geva slovensku gestunum so dygga mótstøðu sum nakar.







# GÓÐ

GÓÐSKA TIL
LÁGAR PRÍSIR







# BETRI

HØG GÓÐSKA
TIL SÁMULIGAR PRÍSIR







# BEST

TOPP GÓÐSKA
TIL GÓÐAR PRÍSIR



## H71

| | | |
|---|---|---|
| 1 | ÁRI **EGASON DAM**, *Føroyar* | *1987* |
| 12 | JÁKUP **JOHANNSEN**, *Føroyar* | *2001* |
| 16 | HØRÐUR **TRYGVASON**, *Føroyar* | *1999* |
| 2 | SAKARIS **A. SAKARISSON**, *Føroyar* | *2001* |
| 3 | PÆTUR **THOMSEN**, *Føroyar* | *1996* |
| 4 | RÚNI **VEST HØJGAARD**, *Føroyar* | *1991* |
| 5 | BALDUR **GILLASON**, *Føroyar* | *2002* |
| 6 | LEIVUR **MORTENSEN**, *Føroyar* | *1999* |
| 7 | ANDRIAS **F. GAARD**, *Føroyar* | *1998* |
| 9 | BERGUR **ÁKASON**, *Føroyar* | *1998* |
| 10 | VILHELM **POULSEN**, *Føroyar* | *1999* |
| 11 | HANS KÁRI **HANSEN**, *Føroyar* | *1989* |
| 14 | SIGMUNDUR **DAHL**, *Føroyar* | *1992* |
| 15 | SVEINUR **OLAFSSON**, *Føroyar* | *2002* |
| 17 | POUL SÍMUN **Í GARÐI**, *Føroyar* | *1995* |
| 18 | PÆTUR **MIKKJALSON**, *Føroyar* | *1997* |
| 21 | DJÓNI **G. JOENSEN**, *Føroyar* | *1996* |
| 23 | HILMAR LEON **JAKOBSEN**, *Føroyar* | *1997* |
| 25 | ELIAS **E. Á SKIPAGØTU**, *Føroyar* | *2002* |
| 26 | JANUS **D. DJURHUUS**, *Føroyar* | *2002* |
| 45 | PETER **KROGH**, *Føroyar* | *1990* |
| 61 | PAULI **MITTÚN**, *Føroyar* | *2002* |
| 71 | BOGI **HANSEN**, *Føroyar* | *2002* |

HØVUÐSVENJARI: EINAR JÓNSSON, ÍSLAND
HJÁLPARVENJARI: PETUR MITTÚN, FØROYAR
MÁLMANSVENJARI: DEJAN LACOK, SERBIA
FYSIOTERAPEUTUR: BARTAL D. ANDREASEN, FØROYAR
LIÐLEIÐARI: ODDUR BECH, FØROYAR
LIÐLEIÐARI: HANUS MORTENSEN, FØROYAR

## RK MARIBOR BRANIK

| | | |
|---|---|---|
| 12 | MARTIN **KOCJANCIC**, *Slovenia* | 1997 |
| 16 | MARK **FERJAN**, *Slovenia* | 1998 |
| 2 | JAN **SIVKA**, *Slovenia* | 1997 |
| 5 | LUKA **KLJUN**, *Slovenia*, | 1996 |
| 7 | NEJC **PLANINSEK**, *Slovenia* | 2000 |
| 11 | NIKOLA **RANEVSKI**, *Slovenia* | 1990 |
| 13 | TADEJ **SOK**, *Slovenia* | 1988 |
| 14 | JAN **HOCEVAR**, *Slovenia* | 2000 |
| 17 | FILIP **JERENEC**, *Slovenia* | 1995 |
| 22 | ANDRAZ **VELKAVRH**, *Slovenia* | 1996 |
| 27 | DANI **ZUGAN**, *Slovenia* | 1997 |
| 30 | IZIDOR **BUDJA**, *Slovenia* | 2000 |
| 32 | MATIJA **GOLIK**, *Kroatia* | 1993 |
| 36 | ADRIJAN **MILICEVIC**, *Kroatia* | 1998 |
| 41 | JULIAN ERNEST **JEREBIE**, *Ungarn* | 1995 |

HØVUÐSVENJARI: MARKO SIBILA, SLOVENIA
HJÁLPARVENJARI: TOMI MATJASIC, SLOVENIA
HJÁLPARVENJARI: VASJA KOZELJ, SLOVENIA
FYSIOTERAPEUTUR: JAN ZNIDER, SLOVENIA






## Betri fyri teg

- Ókeypis Netbanka
- Ókeypis kontur
- Ókeypis gjaldskort
- Ókeypis at veksla valuta
- Ókeypis Boðtænastu
- Avsláttur av tryggingum
- Góðar uppsparingarmøguleikar
- Lestrarkreditt við sera lagaligum treytum
- Ungdómslán við lágari rentu
- Ungdómskundaráðgevar kring landið

Les meira á betri.fo/ung

betri